

**Annlis Bjarkhamar, lærari og fyrrverandi mentamálaráðharri**

"Tað er nakað grundleggjandi galið við einum skúla har helvtin av næmingunum **keða** seg, tí er tað nakað sum næmingarnar ikki eiga at gera í skúlanum, so er tað at keða seg."

"Í føroyska fólkaskúlanum er ongar royndarverkætlanir innan undirvísing, ongin gransking, onki menningararbeiði, næstan ongin eftirútbúgving av lærarum, ikki nøktandi læraraútbúgving, ongar politiskar visjónir frá politiska myndugleikanum, ongar eftirmetingarskipanir, eitt ársverk sum drepur spontanitetin og **eldhugan** millum lærarar, vánaligar hølisumstøður, ótíðarhóskandi og lítið sigandi undirvísingartilfar, ongin greið útmelding frá politisku flokkunum um hvør leiðin hjá fólkaskúlanum skal verða, onki alment kjak um skúlaskap.. Eg kundi hildið áfram, men niðurstøðan í míni verð er púra greið: Alt tað, sum skal til fyri at skapa ein góðan og livandi skúla mangla vit í Føroyum."

"Beint nú tørvar okkum at MMR greitt meldar út hvat tey ætla at gera."

"Heimsins besta skúla fáa vit bara um vit sum samfelag ásanna, hvussu týdningarmikil skúlin í veruleikanum er fyri alla okkara. Fortreytin fyri at skapa ein góðan skúla er, at vit vita, hví vit gera sum vit gera og vit alla tíðina eftirmeta, um vit nú náa teimum málum, sum sett eru fyri fólkaskúlan. Heimsins besta skúla fáa vit bert, um leiðsla og lærarar á teimum einstøku skúlunum hava neyðugu førleikarnar, neyðuga eldhugan og neyðuga umstøðurnar at skapa ein góðan føroyska skúla."



**Katrin D. Jakobsen, lærari og býráðspolitikari í Havn**

"Tað er fyri neyðini, at fólkaskúlin kemur í fokus! Fólkaskúlin sigst avspegla samfelagið. Man tað eisini standa so illa til úti í samfelagnum?"

"Øll mugu taka ábyrgd og alt má fram í ljósið!"

"Í allari øsingini, sum slík kanning leggur eftir seg, mugu vit fyri alt í verðini ikki lata Pisa seta **dagsskránna** fyri tí, vit fáast við í skúlanum."

> "Yngru næmingarnir hava alt ov **stuttan** skúladag."

"Hóast læraraútbúgvingin verður styrkt, so fær lærarin ikki betri tíð. Hann stendur enn **einsamallur** við 26 næmingum."

"Serkøn hjálp, eitt nú sálarfrøðingar, eru ringir at fáa fatur á, tá man frá politiskari síðu ikki hevur hildið slíkt verið átrokandi. Eftirútbúgving av lærarum hevur heldur ikki verið raðfest."

"Stóra styrkin í føroyska fólkaskúlanum er, at vit hava hildið fast við **solidarisku** skipanina. Hetta er serliga umráðandi í so lítlum landi sum okkara."

"Spjaldramerkið skal vera tolsemi, lív, gleði, virkishugur, forvitni, avbjóðingar ella vit kunnu siga, ein skúli, sum livir upp til endamálsorðing fólkaskúlans. Hon er bara so **genial!**"



**Annika Sølvará, setursskrivari á Fróðskaparsetrinum og foreldur**

> "Tað, sum eg fryktaði, gekk út."

"**Foreldur** eiga og kunnu seta orð á nógvar av trupulleikum, sum verða tiknir fram í kanningini."

"Læraraútbúgvingin skal vera ein **bachelorútbúgving**"

"Mín kensla er, at føroyskir næmingar kýta seg meira fysiskt enn intellektuelt í **frítíðini**. Hvat gera teir eftir skúlatíð, um teir ikki gera skúlating ella lesa á bókasavninum: Íðka ítrótt, spæla tónleik, ganga á møti, spæla teldu, ballast? Kanska skuldu vit umhugsað at skera nakað av hesum burtur, so tey kunnu savnað seg um skúlan og fakliga menning."

"Tað ein **uriaspostur** at vera lærari í dag, tí krøvini eru ómetaliga fjølbroytt og umfatandi, meðan tilfeingið er avmarkað. Tað merkist á fleiri lærarum, at teir mangla motivatión, eru uppgevandi, líkasælir ella heilt útbrendir. Nú er høvi til at venda hesi óhugnaligu gongd."

"Heimsins besti skúli brúkar mestu tíðina og orkuna uppá høvuðsuppgávurnar: fakligheit og sosialisering."



**Gyðja Hjalmarsdóttir, lærari, skúlabókvørður og álitisfólk í Vestmanna Skúla**

"Úrslitið av PISA ikki er einki sjokk hjá lærarum. Vit hava gjørt vart við eina rúgvu av tingum millum ár og dag, men tosað hevur verið fyri **deyvum** oyrum."

"Uppgávurnar floyma inní skúlan. Tær fjølgast og broytast, men føroyski lærarin hevur í nógv ár verði við skerdan lut, tá talan er um eftirútbúgving og tímajáttanir. Tað kann tá ikki undra nakran, at tað má síggjast aftur í úrslitunum hjá næmingunum og trivnaðinum hjá lærarunum, um hugt verður eftir **trivnaðarkanningina** hjá lærarafelagnum."

"Lætt verður tað ikki. Nøkur lyklaorð kundu verðið: Seta sær mál, eftirmeting, ábyrgd og virðing."

"So er at vóna, at eisini verður hugt at tí positiva, sum hóast alt eisini er at hóma í niðurstøðuni av kanningini. Tað hava vit onki hoyrt um og er tí kanska uppá sítt pláss, at nevna tað her: næmingarnir **trívast** væl í skúlanum, sosialu relatiónirnar eru góðar, sambandið millum lærara og næming er sum heild gott og tað er ikki líka nógvur gangur í tímunum, sum í Danmark (ikki nóg gott, men álíkavæl)."

"Sum ein maður segði: Pisa ella ikki pisa. Um eg kom í havsneyð á Norðurhavinum, so hevði eg hvørki rópt á finnlending, koreanara ella japanara, nei, eg hevði rópt á ein føroying."

Lagt til rættis: Rigmor Dam
rigmor@sosialurin.fo

## Firouz Gaini um heimsins besta skúla

- ein skúli, ið skapar borgarar, ið hugsa kritiskt og sjálvstøðugt og tora at standa við sítt.
- ein skúli, ið mennir bæði einstaklingin og bólkin (samfelagið)
- ein skúli, ið mennir bæði **likam** og heila
- ein skúli, ið skapar borgarar, ið virða náttúruna og allar mentanir heimsins
- ein skúli, ið bæði stimbrar veik og sterk
- ein skúli, ið skapar borgarar, ið gjarna vilja menna sítt samfelag
- ein skúli, ið er tolerantur og rúmar sera ymisk børn við fjølbroyttum samleikum
- ein skúli, ið hyggur meira at nútíðini og framtíðini enn fortíðini
- ein skúli, ið kennist meira sum "heim" enn stovnur
- ein skúli, har børnini hava fleiri **rættindi**